

# H-BYGNINGUR LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
## INNANÍFRÁ

LANDSVERK

**LANDSVERK**
SUM **BYGGIHARRI**

# INNGANGUR

Nýggi bygningurin til Landssjúkrahúsið, nevndur H-bygningurin, skal takast í nýtslu í 2021.

Bygningurin fer at standa sum ein varði, tá siglt verður inn á Havnina. Í sniðgevingini minnir bygningurin um eitt skip, tá hugt verður at honum frá sjónum. Hæddirnar styttast í longd so hvørt tær koma upp í hædd. Tað ger, at bygningurin fellur væl inn í lendið, sæð frá Argjalandinum. Bygningurin liggur so niðarlaga, at hann í minni mun tekur útsýnið frá verandi bygningum á Landssjúkrahúsinum.

H-bygningurin ger tað møguligt at savna nógv virksemi hjá Landssjúkrahúsinum niðan fyri J. C. Svaboðsgøtu.

Endamálið er at dagføra hølisviðurskiftini hjá sjúklingum, starvsfólkum og avvarðandi. Seingjareindirnar á psykiatriska deplinum og tær medisinsku seingjareindirnar flyta í H-bygningin. Somuleiðis flytur føðideildin í H-bygningin. Talið av seingjarplássum økist ikki munandi, men øll seingjarplássini verða í einastovum.

Bygginevndin hjá Landssjúkrahúsinum, við sjúkrahússtjóranum sum formanni, hevur lagt dent á at minka um smittuvandan við at hava einastovur og at hava skildar gangir til almenna og kliniska ferðslu. Sum fyrsta sjúkrahúsið í heiminum fer H-bygningurin at hava loddrættar goymslur til brúktar og reinar sengur. Hetta avmarkar smittuvandan, og sengurnar eru altíð at finna á einum og sama staði.

Einastovurnar bøta munandi um karmarnar fyri, at samrøður, røkt og viðgerð kann fara fram undir virðiligum og haldgóðum umstøðum. Gransking vísir, at einastova hevur nógvar ágóðar, og at sjúklingar tá koma seg skjótari. Eitt nú minkar smittuvandin, og færri sjúklingar detta og meiðsla seg undir innlegging. Tað henda eisini færri ótilætlaðar hendingar á einastovum, sum t.d. at sjúklingurin fær skeivan heilivág. Tað er eingin órógvan av náttarsvøvninum frá øðrum sjúklingum, og avvarðandi hava væl størri møguleika fyri at vera um tann sjúka. Endamálið við einastovum er tí fyrst og fremst økt sjúklingatrygd. Sum er í hásæti.
At savna virksemið niðan fyri J. C. Svabosgøtu fer eisini at betra um raksturin. Flutningur av mati, ruski, seingjarklæðum, sjúklingaklæðum, starvsfólkabúnum og vørum úr goymsluni verður nógv minni. Frástøðan millum psykiatriska-, medisinska- og kirurgiska depilin og endurvenjingina gerst eisini munandi styttri.

Matarhøllin í nýggja H-bygninginum gerst eitt sentralt savningarstað fyri øll, ið hava sína gongd á Landssjúkrahúsinum. Skiftingarrúm til øll starvsfólk verður staðsett á BO.

Landsverk hevur lagt dent á ein orkusparandi bygning, har spillorkan verður endurnýtt, og tá tað ikki er nógmikið, verður hitin í sjónum nýttur, umvegis hitapumpu. Mest framkomna KT-tøkni verður nýtt í hesi verkætlan til prosjekteringina undir byggingini og til raksturin.

Vónandi gleða øll seg saman við okkum til, at bygningurin verður liðugur, til gagns fyri Føroya fólk.

*Sjúkrahússtjórn*
*Landsverk*





# -2. Hædd

## Goymsla, parkeringskjallari og tøkni

Tað fer at betra munandi um arbeiðsumstøðurnar hjá goymsluni at flyta í hølir, sum eru gjørd til endamálið. Nýggja seingjarvaskimaskinan fer at tryggja eina dygdargóða og einsháttaða reingerð av seingjum. Tað tekur 2,5 tímar at vaska tað sama, sum tvey fólk í dag nýta 8 tímar til.

Tað er eisini í kjallaranum, at logistikskaktir til m.a. seingjarlift og goymsluskipan hava sína miðstøð. Alt hetta fer í stóran mun at gera logistikkin á sjúkrahúsinum nógv smidligari og fer at vera munandi meira savnandi fyri hendan týðandi partin av sjúkrahúsvirkseminum. Parkeringskjallarin fer at rúma 48 bilum, harafturat koma fleiri parkeringspláss á nýggja útiøkinum runt um bygningin. Enn er játtanin til at innrætta goymsluna og parkeringskjallaran ikki komin upp á pláss, men økið er tøkt.



# -1. Hædd

## Psykiatriskur depil og køkur við matstovu

Tann nýggja psykiatriska seingjardeildin, sum liggur í ljósum og friðarligum umhvørvi í nýggja bygninginum, er gjørd soleiðis, at hon kann býtast sundur í fimm eindir, ið kunnu virka hvør sær. Tað eru 25 seingjarstovur til samans og fleiri tilhoyrandi aktivitetsrúm, umframt ein stórur vardur garður.

Høvuðskøkurin er á somu hædd, við matstovu til bæði starvsfólk, sjúklingar, avvarðandi og onnur vitjandi. Í bygninginum er eitt stórt atrium, sum gevur luft og ljós niður til matstovuna.




# 0. Hædd

## Dagtilboð og endurvenjing

Á hesi hæddini verður tann psykiatriska ambulanta viðgerðin, dagtilboð og endurvenjing. Her eru rúm til bólkaterapi, spælirúm til eygleiðing av børnum og tónleikaterapi. Ymisk rúm til ymiskar endurvenjingar og ein stór venjingarhøll til blandað virksemi. Mitt í bygninginum, tætt við atriumrúmið, verður ein móttøka, sum skal leiðbeina fólki, í eitt nú koma til endurvenjing. Eitt av endamálunum við samlokatión av psykiatri (sálarligum sjúkum) og somatik (likamligum sjúkum) er at beina burtur stigmatisering av sálarligum sjúkum og tryggja eins góðar karmar fyri allar sjúklingabólkar.



# 1. Hædd

## Seingjarstovur og Háisolatiónsstovur

Hædd 1 í H-bygninginum er á somu hædd, sum móttøkan í B-bygninginum. Atkoman til H-bygningin verður beint til høgru frá verandi móttøku. Soleiðis vilja tey vitjandi framhaldandi koma inn á sjúkrahúsið, sama veg sum áður. Hendan hæddin hevur 31 einastovur við vesi og bað. Harumframt eru tvær háisolatiónsstovur og tað neyðuga av hjárúmum og starvsfólkarúmum. Háisolatiósstovurnar hava undirtrýst, so luftborin smitta ikki sleppur úr stovunum. Atgongd er eisini beinleiðis til stovurnar útifrá. Stovurnar eru ætlaðar, um tað er mistanki um sjúkur sum SARS, fuglakrím, EBOLA og aðrar vandamiklar smittuspreiðandi sjúkur. Stovurnar kunnu eisini nýtast sum vanligar seingjarstovur.

- ALMENNUR FLUTNINGUR
- KLINISKUR FLUTNINGUR
- HJÁRÚM
- DEILDARKØKUR OG ETIØKI
- EINDARSTØÐ
- STARVSFÓLK - SKRIVSTOVA OG FUNDARHØLI
- SEINGJASTOVA
- VESI - REINGERÐ
- UPPIHALDSSTOVA OG TERASSA
- HÁISOLASJIÓN - SEINGJASTOVUR VM.
- TØKNIRÚM



# 2. Hædd

## Seingjarstovur og føðideild

Tað serliga við hædd 2 í mun til 1 er, at her verða eisini 3 nýggjar føðistovur. Hesar eru eisini staðsettar soleiðis í bygninginum, at tær hava stytst møguligu leið til skurð-gongina, um neyðugt er við akuttum keisaraskurði. Eitt serligt við bygninginum og stovunum er, at alt er sera fleksibult, tvs. stovur kunnu tillagast tørvinum til eina og hvørja tíð, heldur enn at tær eru gjørdar til sermerkt endamál og harvið óegnaðar til annað endamál. Sostatt kunnu stovurnar gagnnýtast optimalt.

- ALMENNUR FLUTNINGUR
- KLINISKUR FLUTNINGUR
- HJÁRÚM
- DEILDARKØKUR OG ETIØKI
- EINDARSTØÐ
- STARVSFÓLK - SKRIVSTOVA OG FUNDARHØLI
- SEINGJASTOVA
- VESI - REINGERÐ
- UPPIHALDSSTOVA OG TERASSA
- FØÐIDEILD - STOVA OG KANNINGARRÚM
- TØKNIRÚM



# 3. Hædd

## Tøkni

Ovasta hæddin er fylt við tøkni, serliga ventilatión.

- TØKNIRÚM - VENTILASJÓN, EL OG KT
- FLUTNINGUR





# FAKTA UM H-BYGNINGIN

Samlaða fermetratalið er 14.500.
Kostnaður: H-bygningurin er ein partur av samlaðu játtanini til um- og útbygging av Landssjúkrahúsinum frá 2009 til 2021. Játtanin er 652,6 mió. krónur, harav 507,9 mió. krónur eru til H-bygningin.

| | |
|---|---|
| Arbeiðsánari: | **HIMR** |
| Rakstraránari: | **Landssjúkrahúsið** |
| Byggiharri: | **Landsverk** |
| Ráðgeving: | **Faerport II** (Heildar ráðgevi) |
| | **Ráð** (partvís) |
| | **RosanBosch** |
| | **BKD Rådgivning** |
| | **Logisystems** |
| Arbeiðstakarar: | **Grettir** |
| | **MT Højgaard Føroyar** |
| | **Húsavarðartænastan** |
| | **Demich** |
| | **EL.FO** |

# FAKTA

| | |
|---|---|
| Vídd: | **14.500 m2** |
| Hæddir: | **5 + tøknihædd á 6. hædd** |
| Kopar: | **3.000 m2** |
| Betong: | **18.500 tons** |
| Stál: | **1.000 tons** |
| EL: | **200.000 m kaðal**<br>**3.250 ljósarmatur** |
| HVS: | **110.000 m3/h luft**<br>**38.500 m av rørum**<br>**3.500 m av kanalum** |
| Hitakelda: | **Endurnýtsla av avlopshita frá B-bygninginum og sjóhita.** |

SENDISTOVAN

**Landsverk**
Tinghúsvegur 5
Postsmoga 78
FO-110 Tórshavn

Tel. +298 340 800
lv@lv.fo
www.landsverk.fo